# Mál- og avrikssáttmáli

millum

TAKS og Fíggjarmálaráðið

2016

## Inngangur

TAKS er fyrisitingarliga skipað sum ein stovnur undir landsstýrismanninum í fíggjarmálum við skrivstovueindum kring landið.

Høvuðsuppgávan hjá stovninum er at umsita toll-, avgjalds-, MVG- og inntøkuskattalógina.

Aðrar umsitingarligar uppgávur hjá TAKS eru:

- Umsiting av frítíðarløn og trygdargrunni løntakaranna.
- Umsiting av Eftirlønarlógini
- Umsiting av Barsilskipanini
- Umsiting av Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin
- At krevja inn gjald til Arbeiðsloysisskipanina.
- At umsita FAS-skipanina.
- At krevja inn almenna skuld.
- At umsita stuðulslóggávu.
- Innkrevjing av Heilsutrygd.
- Innkrevjing og útgjalding úr Vinnusjúkugrunninum.
- Innkrevjing av Kringsvarpsgjaldinum
- Lóggávuarbeiði fyri Fíggjarmálaráðið og ráðgeving um galdandi lóggávu og um onnur viðurskifti á skatta- og avgjaldsøkinum.

<table>
<tr><td>Missión<br>TAKS tryggjar tí almenna skatta- og avgjaldsinntøkur, umsitur gjøld og veitingar, og fyribyrgir ólógligum inn- og útflutningi</td><td>Visjón<br>Taks skal vera besti stovnur í Føroyum</td></tr>
<tr><td colspan="2">Virðir<br>Vit virðismeta virkisfýsni<br>Trúvirði er ein fyritreyt fyri okkara arbeiði<br>Vit eru tænastusinnað<br>Menning og vitan er avgerandi fyri okkum<br>Vit eru einstaklingar, men partar av eini heild<br>Okkara úrslit eru best, tá ið vit trívast</td></tr>
</table>

### Lýsing av TAKS

TAKS skal veita eina góða tænastu og hava eftirlit við, at landskassin fær lógarásettu inntøkurnar.
Skattaborgararnir eru vorðnir alsamt meira ymiskir við ymiskum tørvi á tænastum. Gongdin setir tí eisini onnur krøv til uppgávurnar og tænasturnar hjá stovninum.
Tað er umráðandi, at skattaumsitingin er virkin, og at stovnurin framhaldandi mennir KT-skipanir og samskifti sum eina heild.
KT-menningin seinnu árini gevur TAKS partvís møguleika at lata viðskiftafólkini avgreiða síni viðurskifti sjálvi við sjálvavgreiðslum á internetinum. TAKS fer eisini í 2016 at raðfesta KT-verkætlanir, sum stuðla undir at viðskiftafólkini í størri og størri mun kunnu avgreiða síni viðurskifti við TAKS við sjálvsgreiðslum.

Neyðugt er at tryggja, at stovnurin hevur røttu arbeiðsamboðini, m.a. KT-amboð og førleikar. Tilgongdirnar skulu eggja til kreativitet, tvørfakligt samstarv, effektivitet og proaktivitet.

## TAKS - Upplýsing og eftirlit

TAKS hevur bundnar arbeiðsuppgávur, sum yvirskipað eru orðaðar í missióni. Hesar uppgávur skulu loysast bæði við upplýsing og eftirliti.

Við upplýsing, soleiðis at okkara kundar á ein lættan og rættan hátt, skilja og vilja bera seg rætt at mótvegis TAKS.

Við eftirliti, soleiðis at okkara kundar eisini vita av, og kunnu rokna við at TAKS hevur eitt vælvirkandi eftirlit, og at tað tískil er skilabest at hava síni TAKS-viðurskifti í lagi.

Býtið ímillum upplýsing og eftirlit er trupult at áseta, og fer eisini at broytast frá einum tíðarskeiði til annað eftir tørvi, men tað skal eingin ivi verða um, at TAKS-arbeiðið er grundað á hesi bæði grundsjónarmiðini. Í 2016 verða hesi bæði javnt raðfest, men tó soleiðis at arbeitt verður framímóti at styrkja eftirlitspartin, uttan at tað gongur útyvir upplýsingarpartin.

## Yvirskipað strategitarbeiði

Í 2015 gjørdi TAKS eitt miðvíst strategiarbeiði. Yvirskipað varð staðfest at missjón, visjón og virðisgrundalag verða óbroytt komandi árini. Strategiin varð gjørd meira ítøkilig fyri komandi 3 árini, og yvirskipað er strategiin brotin niður í 3 fokusøki:

- Kundin
- Null inntøpping
- Betri eftirlit

Undir hesum 3 fokusøkjunum eru so raðfest 16 átøk sum skulu fremjast og menna TAKS komandi 3 árini. Fokusøkini og átøkini eru útgreinaði í serligum stratgiskjali.

Yvirskipaði tankin við øllum arbeiðinum hjá TAKS skal vera at betra um um umdømi hjá TAKS á øllum økjum. Á tann hátt verður langsigtaða uppgávan hjá TAKS lættari, og bæði viðskiftafólk og starvsfólk verða nøgdari.

Hesi fokusøkið síggjast aftur í útvaldu verkætlanunum aftast í hesum sáttmálanum.

## Eftirlitsætlan

Fyri at styrkja og skipa eftirlitið, eru ætlanir gjørdar fyri ymsu fakligu økini hjá TAKS. Ætlan er gjørd fyri skatt, MVG, toll, stuðlar og innheinting.

***Sjónligt eftirlit***

Eftirlitsætlanirnar taka m.a. støði í, at TAKS skal vera sjónligt. Hetta byggir á grundstøði um, at er TAKS sjónligt, hevur tað eitt fyribyrgjandi árin. Kunnleiki skal vera um vágan av tilvitað at bróta reglurnar. Eitt sjónligt TAKS tekur eisini støði í, at samskifti skal betrast, og hugburðurin til TAKS skal betrast. Avleiðingin er, at samstarvið millum TAKS og viðskiftafólkini betrast, og harvið eisini úrslitið bæði fyri viðskiftafólkini og fyri TAKS. Eisini snýr TAKS sjónligt seg um, at TAKS ger sær stóran ómak, at tað skal vera lætt at gera rætt.

***Málrættað eftirlit***

Eftirlitsøkini verða vald m.a. við støði í, um tað fyriliggja upplýsingar, sum benda á, at tað eru ymiskar fatanir av, hvussu reglurnar skulu skiljast og umsitast.

Váðametingar, og tann fyrimunur vit hava við at búgva í einum lítlum samfelagið, skulu vera grundarlagið fyri, hvørji eftirlit skulu gerast. Stórur dentur skal leggjast á, at eftirlitini skapa best møguligt gagn. Mett skal vera í hvørjum føri um týdningin fyri júst at gera ávísa eftirlitið innan ávísa virkisøkið.

Fyri at økja um virkni er neyðugt at fáa tey røttu amboðini í samband við eftirlitsarbeiði. Tað skal verða lættari og skjótari at taka út eftirlitshagtøl.

Úrslitini av eftirlitsarbeiðinum eru, umframt úrslitini av ítøkiligu eftirlitunum, at uppskot skulu gerast til rundskriv og/ella greiðari vegleiðing til lóggávuøkini ella uppskot til møguligar lóggávubroytingar, so ivamál og ógreiða verða burturbeind. Kunningarátøk kunnu eisini verða úrslit av eftirlitsarbeiðinum, og TAKS metir í hvørjum einstøkum føri hvørt eftirlitsátøkini skulu miðlast út alment ella ikki.

***KT-umleggingin á Elektron skuldi ætlandi verða liðug í november 2015. Hetta eydnaðist ikki, men verður væntandi liðug í 2016. Hetta kemur at ávirka arbeiði hjá TAKS í 2016. Talan er serliga um at starvsfólkini koma at brúka orku til at testa nýggju KT-tøknina, og alt í mun til hvussu hetta arbeiði gongur, kemur tað at ávirka dagliga arbeiði á ymisku deildunum.***

***Samlaðu eftirlitsmálini eru:***

| Slag av eftirliti | Ábyrgd | *Ætlað 2014* | Staðfest 2014 | *Ætlað 2015* | Staðfest 2015 | *Ætlað 2016* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skattur/persónar** | Løntakaraeftirlitið | | | | | |
| **Skattur/vinnuligt** | Virkiseftirlitið | | | | | |
| **MVG** | MVG-deildin | | | | | |
| **Tollur** | Tollbúðin | | | | | |
| **Rentustuðul** | Tvøroyri | | | | | |
| **Ferðastuðul** | Tvøroyri | | | | | |
| **Eftirlit íalt** | | | | | | |

*[1]Herav xxx útgjaldseftirlit*

*[2]xxx útgjaldseftirlit og xxx MVG-vitjanir*

*[3] Serligt átak varð gjørt í ferðastuðlunum, .........*

Í 2017 verður "verkætlanin eRoknskap" endaliga sett í verk. Hetta kemur at ávirkað arbeiðið í eftirlitspartinum í 2016, tí orka skal brúkast til at fyrireika og testa tær skipanir, ið skulu taka ímóti teimum upplýsingunum sum koma inn í nýggjum formati. Í hesum sambandi skal fyrireikandi arbeiði við databasum og leitingum gerast, og starvsfókini skulu førleikamennast til at arbeiða eftir hesum nýggja leisti.

Eftirlitið verður annars sum vanligt í stóran mun grundað á hvat hvat fellur í eyguni hjá starvsfólkunum undir líkningini, og tá verða "áhugaverdar" sakir lagdar til síðis til nærri kanningar. Eisini verður støða tikin til fráboðanir um óreglusemi og tað sum annars rørist í samfelagnum. Tí er eisini trupult at nágreina júst hvat eftilitsarbeiði verður løgd størst áherðsla á ella hvat fer at fylla mest í 2016, men tó er raðfest m.a at arbeiða við hesum:

- XXX
    - Xxxx.....
    - Xx....
    - Xxx...
- XXX.
- XXX

- XXX
- XXX
- XXX
- XXX
- XXX
- XXX
- XXX
- XXX
- XXX

Eitt av fokusøkjunum í nýggju strategiini er at betra eftirlitið, og eitt átak byrjar tíðliga í 2016, sum helst eisini kemur at ávirka arbeiðið í eftirlitinum skeiva vegin í byrjanini, men fer sum frálíður at betra eftirlitið.

## Innheinting

Ultimo 2015 var samlaða eftirstøðan 325 mió., og var hetta 18 mió. minni enn ultimo 2014. Størsta minkingin var í MVG. Í 2016 er ætlanin at samlaða eftirstøðan skal minka við 2%.

***Innheintingarmál fyri 2016***

| | Ultimo 2013 | Ultimo 2014 | Ultimo 2015 | Ultimo 2016 |
|---|---|---|---|---|
| **MVG** | 89.600.000 | 78.700.000 | 67.000.000 | *60.000.000* |
| **B-skattur** | 22.100.000 | 20.500.000 | 19.600.000 | *19.200.000* |
| **Írestandi skattur** | 89.500.000 | 85.500.000 | 85.800.000 | *84.100.000* |
| **Partafelagsskattur** | 36.500.000 | 35.300.000 | 32.000.000 | *31.4000.00* |
| **Morarentur** | | 78.800.000 | 79.100.000 | *80.000.000* |
| **Annað*** | 112.400.000 | 43.700.000 | 41.900.000 | *44.200.000* |
| **Tilsamans** | **350.100.000** | **342.500.000** | **325.400.000** | ***318.900.000*** |

**Bólkurin "Annað" er samansettur av 30 ymiskum kravsløgum, t.d. Barnapengar, útendsk krøv, Heilsutrygd og annað. Umframt nýtt kravslag í 2016 er Kringvarpsgjaldið.*

## TAKS savnar seg um trý høvuðsevni

**Kundin**

Endamálið er at veita kundanum lættari og betri atgongd til TAKS og til ta kunning, sum honum tørvar, og at geva honum greið svar beinanvegin. Við hesum fáa vit nøgdari og sjálvbjargnari kundar, ið hava minni tørv á at venda sær beinleiðis til TAKS, samstundis sum vit fáa givið teimum, ið venda sær til okkara, eina neyvari og betri tænastu. Í stuttum skal kundin merkja, at TAKS er ein tænastusinnaður stovnur.

**Null inntøpping**

Endamálið er at betra og menna raksturin, at burturbeina manuellar arbeiðsuppgávur og at frígeva orku til betri tænastu, innaneftirlit, eftirlitsuppgávur og menning. Við hesum fáa vit ein nógv betri rakstur, sum gevur møguleika fyri at veita betri, bíligari og skjótari tænastu til borgaran, vinnuna og samfelagið sum heild. Hetta gevur eisini møguleika fyri, at starvsfólkini kunnu fáa meiri áhugaverdar og mennandi uppgávur.

**Betri eftirlit**

Endamálið er at betra um eftirlitið hjá TAKS við at savna og menna eftirlitsførleikarnar, skipa eftirlitið betur og harvið gera tað meiri beinrakið. Rakstur og eftirlit verða atskild sum mest, tí við betri eftirliti fær landið rættari inntøkur og betri verju móti ólógligum inn- og útflutningi.

## TAKS fremur 15 átøk fyri at vera besti almenni stovnur í Føroyum

Høvuðsevnini og átøkini fara at ávirka leiðsuavgerðir og fíggjarligar raðfestingar, soleiðis at málini verða nádd. Tí verður ein skilagóð leiðslurapportering gjørd. Leiðslurapporteringin tekur støði í eini hagtalsgreining, sum síðan verður ment til eina hagtalsstýring. Við hesum fær leiðslan eitt amboð, sum skapar grundarlag fyri rættari avgerðum, ið eru grundaðar á hagtøl og fakta.

| Høvuðsevni | Átøk |
|---|---|
| Kundin | • Gluggar, heimasíða og einar online-dyr til alt<br>• Track'n trace<br>• Fleirtjóða kunning á heimasíðu<br>• Facebook og aðrir sosialir miðlar<br>• Serlig kunning til áhugabólkar<br>• Góð tænasta |

| | |
|---|---|
| | • Samstarv og flow millum deildir |
| Null inntøpping | • Automatiseringar<br>• Sjálvgreiðslur<br>• Optimera/nútíðargera fakskipan<br>• 360<br>• Førleikamenning |
| Betri eftirlit | • Rætta fólkið til røttu uppgávuna<br>• Tillaga bygnaðin<br>• Hagtøl sum eftirlitsamboð |

**TAKS fremur átøkini innan trý ár**

Leiðslan skipar fyri leypandi yvirliti yvir støðuna, setir í gongd og ansar eftir, at einstøku átøkini verða framd sambært ætlanini. Leiðslan fylgir upp, tá einstøku átøkini eru liðug. Hetta fyri at tryggja, at TAKS veruliga fær tað burtur úr átøkunum, sum ætlanin er.

| **Ár** | | **2016** | | | | **2017** | | | | **2018** | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ársfjórðingur** | | **1** | **2** | **3** | **4** | **1** | **2** | **3** | **4** | **1** | **2** | **3** | **4** |
| | **Ábyrgd** | | | | | | | | | | | | |
| **Kundin** | | | | | | | | | | | | | |
| Gluggar, heimasíða og einar online-dyr til alt | ÓB/HDH/PáL | | | | | | | | | | | | |
| Track'n trace | DG | | | | | | | | | | | | |
| Fleirtjóða kunning á heimasíðu | DG/HDH | | | | | | | | | | | | |
| Facebook og aðrir sosialir miðlar | HDH | | | | | | | | | | | | |
| Serlig kunning til áhugabólkar | DG/HDH | | | | | | | | | | | | |
| Góð tænasta | DG | | | | | | | | | | | | |
| Samstarv og flow millum deildir | ÓB/DG | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | |
| **Null inntøpping** | | | | | | | | | | | | | |
| Automatiseringar | ÓB | | | | | | | | | | | | |
| Sjálvgreiðslur | ÓB | | | | | | | | | | | | |
| Optimera/nútíðargera fakskipan | ÓB | | | | | | | | | | | | |
| 360 | DG/JCO | | | | | | | | | | | | |
| Førleikamenning | HDH | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | |
| **Betri eftirlit** | | | | | | | | | | | | | |
| Rætta fólkið til røttu uppgávuna | JCO/EJ/PáL | | | | | | | | | | | | |
| Tillaga bygnaðin | JCO/EJ/PáL | | | | | | | | | | | | |
| Hagtøl sum eftirlitsamboð | ÓB/JCO/EJ/PáL | | | | | | | | | | | | |

Avtalað er, at TAKS ger kvartárligar statusfrágreiðingar til Fíggjarmálaráðið. Hesar frágreiðingar vísa ein stuttan og greiðan status uppá tey viðurskifti, sum beinleiðis kunnu mátast.

Tórshavn, hin 06. apríl 2016

| | |
|---|---|
| ______________________________ | ________________________________ |
| Bjarni A. Bjarnason | Eyðun Mørkøre |
| Fíggjarmálaráðið | TAKS |